# Ársfrágreiðing

# 2023



# Ársfrágreiðing 2023

Her verður í stuttum greitt frá virkseminum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í 2023. Sambært viðtøkunum skal Ráðið fyri Ferðslutrygd í fyrsta lagi gera ferðsluna tryggari við at betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi, við støði í Nullhugsjónini.

## Ongin læt lív í ferðsluni í 2023

Árið í fjør gjørdist aftur eitt 0-ár. Hetta er sostatt triðju ferð í nýggjari tíð, at ongin læt lív í føroysku ferðsluni. Fyri hetta skulu vit heilt aftur til 1967 fyri at finna eitt ár, har ongin doyði í ferðsluvanlukku.

Tá 0-hugsjónin gjørdist ein partur av føroysku ferðslulógini og harvið yvirskipaði arbeiðssetningurin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, vóru fleiri sum hildu tað vera utopi. Hugburðurin var, at har tað er ferðsla, mugu skaðar henda. Men gongdin seinastu nógvu árini hevur víst, at tað ber til at minka um talið av ferðsluvanlukkum. Hetta er ikki bara galdandi her hjá okkum, men eisini í londunum kring um okkum. Men tað kemur ikki av ongum. Átøk, upplýsing, undirvísing, herðingar í ferðslulógini, 'vágin' fyri at fáa bøtur/klipp í koyrikortið, tryggari bilar, betri og tryggari veganet. Alt hevur ávirkan.

Tú sær ikki úrslitini í morgin, men um vit hyggja ár aftur, so er nógv hent til tað betra. Vit síggja tað í hagtølunum og vit síggja tað í hagtølunum í grannalondunum. Tað munar!

Í alt eru 292 fólk deyð í ferðsluni í Føroyum, síðani fyrsta ferðsluvanlukkan kravdi eitt mannalív í 1928.

Eins og undanfarin ár samanbera vit okkum við nærmastu grannalond okkara. Har síggja vit at gongdin seinnu árini hevur verið jalig. Søguliga hava vit ligið væl hægri enn tey londini, sum vit gjarna vilja samanberast við, men við lágu tølunum seinastu árini, er gongdin farin at líkjast hinum norðurlondunum alt meira. Og faktisk eru okkara tøl tey lægstu í norðanlondum hesaferð. Hetta er gleðiligt.

Av tí at Føroyar eru smáar og okkara hagtøl smá, kann ein álvarslig ferðsluvanlukka ávirka hagtølini ógvusliga. Vit hyggja tí vanliga eftir einum 5 ára miðaltali.

Tá vit samanbera okkum við hini norðurlondini, verða tølini brúkt við útgangsstøði í tal av deyðum í ferðsluni pr. 100.000 íbúgvar. Seinastu árini hava Føroyar ligið aftast samanborið við hini norðurlondini, men við lágu tølunum seinnu árini liggja Føroyar fremst í 2023, tá vit hyggja eftir 5 ára miðaltalinum. Úrslitið fyri 2023 er 1,46 deyð pr. 100.000 íbúgvar (5 ára miðal). Til samanberingar var hetta talið 1,47 í 2022 - 1,49 í 2021 og 2,27 í 2020. Flestu grannalondini hava havt ein vøkstur í ferðsluvanlukkum eftir 2020, tá korona-árið hevði søguliga lág tøl. Hetta tikist nú hava javnað seg og eftir Føroyar hava nú Noreg og Ísland frægastu úrslitini á beint omanfyri 2,0 fyri 2023.

Í talvuni á næstu síðu eru tølini samanborin við hini norðurlondini. Neyðugt er at hava í huga, at Ísland, eins og Føroyar, hava smá hagtøl, og tí ávirka sveiggj í tølunum eisini serliga nógv. Tað ber kurvan eisini brá av.




## Ferðsluóhapp við fólkaskaða

Í 'Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar 2019–2027' er høvuðsmálið, at talið av ferðsluóhappum við fólkaskaða skal vera 30% minni í 2027 við støði í tølum frá 2018. Hetta merkir nágreiniliga, at talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða skal í mesta lagi verða 21 óhapp í 2027 (fyri árið 2023 í mesta lagi 25).

Um hugt verður eftir tali av óhappum við fólkaskaða seinnu árini, síggja vit ikki somu jaligu gongd, sum við talinum av deyðsvanlukkum. Hetta talið er nevniliga ikki broytt munandi tey síðstu 10 árini, men hevur ligið á uml. 30-35 hvørt ár. Um aldarskiftið var hetta talið annars tvífalt so stórt. Og tað hendi ein stór broyting, millum annað tá promillumarkið varð broytt og skipanin við klipp í koyrikortið fyri ávís ferðslubrot varð sett í verk. Men síðani hevur talið av ferðsluóhappum við fólkaskaða verið á leið tað sama.

0-hugsjónin sigur tó, at ongin skal doyggja ella fáa varandi mein í ferðsluni í Føroyum. Tí má annað og meira til, fyri at fáa talið av óhappum við fólkaskaða enn longur niður.

Í 2023 skrásetti politiið 30 ferðsluóhapp við fólkaskaða. Tað eru 3 færri enn í 2022, men samsvarar annars stagneraðu gongdina seinastu tíggju árini. Samanborið við málið í Ferðslutrygdaraætlanini, er tað ikki nøktandi.




Av teimum 30 óhappunum við fólkaskaða vóru 2 teirra óhapp, har rúsdrekka, ella rúsevni/heilivágur var íblandaður. Hetta er eitt vet lægri enn árið fyri, tá hetta talið var 4. Aftur her eru tølini smá og viðbrekin, men rákið er ikki lovandi, tí talið á teimum, sum verða tikin fyri rúskoyring er vaksandi. Í 2023 vórðu sostatt heili 147 skuldsetingar fyri rúskoyring (hetta eru førarar, sum hava verið í ferðsluóhappi við og uttan fólkaskaða, umframt teir, sum verða steðgaðir í eftirliti hjá politinum). Tað er eitt vet lægri enn í 2022, við 161, sum annars var methøgt og tað hægsta síðani 2008.

Sambært ferðslutrygdarætlanini eru fremstu tilmælini til at røkka málinum í 2027 millum annað, at ein skipað **skaðakanning** verður sett í verk av álvarsligum ferðsluóhappum, og at arbeitt verður miðvíst við at fáa til vega betri **hagtøl**.

Ljósari tíðir eru fyri framman, tí arbeiðið at fyrireika skaðakanning av ferðsluvanlukkum fór í gongd í 2023, tá RFF fekk eina lítla meirjáttan, sum er oyramerkt til júst hetta. Í fyrstu atløgu verður arbeitt juridiskt, tí serlóg má snikkast til endamálið, sum heimilar neyðugu pørtunum at heinta og lata upplýsingar, sum skulu nýtast í kanningararbeiðinum. Útgangsstøði verður tikið í íslendska skaðakanningararbeiðinum.

Harumframt fer Løgtingið væntandi at samtykkja nakrar broytingar í ferðslulógini í vár, sum fara at hava jaliga ávirkan á ferðsluhagtølini. Serliga er tað herd lógarkrøv til handhildnað teleútgerð í bilinum, sum er týdningarmikið at fáa í gildi. Hetta er tilmæli nummar 54 í Ferðslutrygdarætlanini.



RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

## Landsfevnandi átøk í 2023

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í 2023 framt átøk viðvíkjandi gáloysni, rúskoyring, ferð, skúlabyrjan og endurskinum, umframt framleitt tilfar til blinki-átak, sum er framt á vári 2024. Afturvendandi tiltøkini Ferðsludagar fyri 8. flokkum, súkkluhjálmar til øll børn í 1. flokki og endurskinsvestar til yngstu skúlanæmingarnar vóru eisini partur av virkseminum í 2023.

**Ferð**

Spildurnýtt ferðátak, framleitt í samstarvi við Trygd og Betri trygging, varð framt í januar 2023.

Átakið er ein roynd at fáa kjak millum fólk um ferð, har vit seta spurningin 'Er tað ókey at koyra ov skjótt?'. Tað má sigast at vera eydnað, tí sera nógv hava eina meining um evnið.




Boðskapurin í átakinum kom fram í filmi, sum varð vístur í sjónvarpi, biografi og á sosialum miðlum. Filmurin tekur støði í uppáhaldinum hjá mongum um, at tað ikki hevur so nógv uppá seg at koyra ov skjótt. Tí næstan øll gera tað. Hugburðurin er, at tað í stóran mun verður góðtikið at koyra ov skjótt. Men tá tað verður samanborið við t.d. at taka vørur í einum handli, uttan at rinda fyri tær, vilja vit vísa, at tað er eins ólógligt at koyra ov skjótt, sum tað er at stjala.




| | Everybody (500) | 18 - 29 (100) | 30 - 44 (130) | 45 - 59 (135) | 60 - 80 (135) |
|---|---|---|---|---|---|
| 80 km/t ella seinni | 31.20% | 26.00% | 21.54% | 25.19% | 50.37% |
| 90 km/t | 62.80% | 70.00% | 66.15% | 70.37% | 46.67% |
| 100 km/t ella skjótari | 4.00% | 3.00% | 9.23% | 2.96% | 0.74% |
| Eg koyri ikki bil sjálv/ur | 2.00% | 1.00% | 3.08% | 1.48% | 2.22% |

Ov nógv ferð er ein stór avbjóðing fyri ferðslutrygdina. Ov nógv ferð økir um vandan fyri at óhapp henda og skaðarnir av ferðsluóhappum verða størri og ógvusligari, tess skjótari koyrt verður. Vit hava spurt føroyingar um teirra vanar í ferðsluni og tað sæst at aldur og royndir hava ávirkan á atburðin.

Men tá tað kemur til ferð, eru tað næstan øll, sum koyra ov skjótt. Heili 63% siga seg vanliga koyra 90 km/t. Og tað er rættiliga javnt býtt á aldursbólkar. Aldursbólkurin 60 ár og eldri siga seg í minst mun koyra ov skjótt. Men har er talið framvegis 50%. Samstundis vita vit, at tað er samband millum hvussu skjótt tú vanliga koyrir, og hvussu ofta tú upplivir vandastøður í ferðsluni. Tí hevur tað alstóran týdning at fáa kjak í lag um ferð, so vit kunnu bróta mynstrið, so tað verður eins lítið góðtikið at koyra ov skjótt, sum tað er at stjala.




| | Everybody (500) | 18 - 29 (100) | 30 - 44 (130) | 45 - 59 (135) | 60 - 80 (135) |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 17.80% | 22.00% | 20.77% | 19.26% | 10.37% |
| Nei | 71.60% | 61.00% | 63.85% | 76.30% | 82.22% |
| Veit ikki | 10.60% | 17.00% | 15.38% | 4.44% | 7.41% |

Og tað er okkurt, ið týðir uppá, at tað er nakað at arbeiða við. Tí tá vit spyrja beinleiðis, heldur næstan ongin í veruleikanum at tað er 'ókey at koyra ov skjótt'.

**Gáloysni**
Í apríl framdu vit aftur átakið ”Koyr. Bara. Alt annað er býtt”. Hetta var triðju ferð átakið var framt og nýtt átak um gáloysni verður framleitt í 2024.

Átakið heitir á bilføraran um at hugsavna seg um at koyra bil. Og bara tað.

Boðskapurin kom fram í filmi, sum var vístur í sjónvarpi, á alnótini, í miðlum og biografi. Í filminum síggja vit tann ørkymlaða bilføraran, sum so fegin vil hugsavna seg um at koyra bil, men tað er so freistandi at lata seg órógva – serliga av telefonini. At enda steðgar hann øllum órógvi og hugsavnar seg um at koyra. Bara. Tí alt annað er býtt.




Tá um gáloysni ræður, er handhildin telefon ein avgjørdur vandafaktorur. Og hóast tú fært bót fyri at tosa í handhildna telefon, skrivar politiið sera ofta bøtur til bilførarar fyri júst hetta brotið. Heilt neyvt 342 ferðir í 2023!

Tilmæli nr. 54 í Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar er, at brotið at tosa í handhildnað telefon sum bilførari skal revsast harðari. Bótin eigur at hækka úr verandi 1000 kr og eisini eigur tað at geva klipp í koyrikortið. Síðani 1. januar 2019 hevur júst hetta verið galdandi í Danmark.

Tað er tí gleðiligt at Løgtingið júst í hesum døgum viðgerð broytingauppskot til Ferðslulógina, sum m.a. hevur hesar broytingar við sær: Hægri bót, klipp í koyrikortið, og eina víðari merking av hugtakinum, so tað fevnir um fartelefon og aðra handhildnað teleútgerð, sum heldur ikki eigur at verða nýtt, meðan tú koyrir bil – t.d. snild-ur.




| | Everybody (478) | 18 - 29 (93) | 30 - 44 (124) | 45 - 59 (132) | 60 - 80 (129) |
|---|---|---|---|---|---|
| ongantíð | 52.93% | 26.88% | 50.00% | 51.52% | 75.97% |
| sjáldan | 29.92% | 40.86% | 31.45% | 33.33% | 17.05% |
| við hvørt | 13.39% | 22.58% | 15.32% | 12.12% | 6.20% |
| ofta | 3.56% | 9.68% | 2.42% | 3.03% | 0.78% |
| altíð | 0.21% | 0.00% | 0.81% | 0.00% | 0.00% |

Seinnu árini hava vit spurt føroyingar um teirra hugburð til nýtslu av handhildnari telefon, meðan koyrt verður. Í 2023 hava vit eisini spurt føroyingar um hugburðin til bót og klipp í koyrikortið fyri handhildnað fartelefon.

Umleið annarhvør (53%) sigur, at tey ongantíð brúka telefonina, meðan tey koyra bil. 30% siga 'sjáldan', 13% 'viðhvørt' og 4% 'ofta'.

Tað er tó sera stórur aldursmunur, har serliga teir yngstu bilførararnir (18-29 ár) í nógv størri mun brúka fartelefonina í bilinum. Her eru tað einans 27%, sum siga, at tey ongantíð brúka telefonina í bilinum. 41% siga 'sjáldan', 23% siga 'viðhvørt' og heili 10% siga 'ofta'.

Kanningin vísir eisini, at tað er á leið líka vanligt at brúka fartelefonina til at senda sms, teldupost, ella messenger, sum tað er at tosa í telefon.

Hinvegin eru tað sera fá, sum siga seg brúka fartelefonina til facebook, instagram og aðrar miðlar, meðan tey koyra. Tá eru tað heili 80%, sum svara 'ongantíð'.

Tá tað kemur til kynsbýti, eru tað í størri mun menn, sum brúka telefonina, meðan teir koyra bil.




| | Everybody (500) | Hægri (228) | Hóskandi (197) | Lægri (42) |
|---|---|---|---|---|
| Ja | 52.20% | 77.19% | 28.93% | 38.10% |
| Nei | 31.00% | 11.40% | 48.73% | 57.14% |
| Veit ikki | 16.80% | 11.40% | 22.34% | 4.76% |

Fólk eru tvíbýtt, tá vit spyrja um bótina á 1000kr. 40% meta bótina vera hóskandi, meðan 46% meta, at hon eigur at vera hægri. 8% halda at bótin eigur at vera lægri.

Her er aldursmunurin ikki so stórur, men serliga tey 30-44 ára gomlu halda, at bótin er hóskandi.

Annarhvør (52%) halda, at tað eigur at geva klipp í koyrikortið, um bilførari brúkar handhildna fartelefon. 31% siga ‘nei’, meðan 17% ikki vita. Tað er týðuligur samanhangur millum hugburðin til bótina og spurningin um klipp í koyrikortið. Sostatt siga næstan 80% av teimum, sum halda at bótin eigur at vera hægri, at tað eisini eigur at geva klipp í koyrikortið.







Vónandi og væntandi verður ferðslulógin broytt í vár soleiðis, at klipp og hægri bót verður givin fyri nýtslu av handhildnari teleútgerð í bilinum. Og spennandi verður at fylgja, hvussu hetta fer at síggjast aftur í hagtølunum fyri óhapp og bøtur/klipp, sum verða

givin fyri hetta brotið í framtíðini. Tí ásannast má, at atburðurin broytist, tá vandin fyri at fáa klipp í koyrikortið er til staðar.

Lítið er at ivast í, at tørvurin á framhaldandi átøkum á hesum økinum eru ógvuliga týdningarmikil.

**Rúsátak**
Hóast hugburðurin til rúskoyring er munandi bøttur seinastu nógvu árini, og nógv tey flestu siga seg taka frástøðu til rúskoyring, henda framvegis ferðsluóhapp orsaka av rúskoyring. Og tíverri hoyra vit eisini javnan um at politiið steðgar fólki, sum ikki burdu sett seg handan róðrið. Tað er munur á hugburði og atburði! Og tí er framvegis týdningarmikið at fremja rúsátøk.

Í 2023 framleiddu vit spildurnýtt rúsátak og tað var framt í juli og aftur í november/desember, tá jólaborðhaldini vóru í hæddini.

Støði varð tikið í aktuella órógvandi rákinum, har ábendingar eru um at fólk í størri mun aftur koyra rúsaði (við rúsdrekka, men eisini í størri og størri mun við rúsevnum), serliga eru tað blaðung fólk. Hetta er eitt rák sum sæst aftur í grannalondum okkara.




Ein nýggjur filmur varð framleiddur, sum sera rámandi letur hyggjaran síggja eina ógvusliga hending gjøgnum eyguni hjá einum ungum bilførara, júst eftir at okkurt álvarsamt er hent. Vit hoyra hennara tankar. Hon hevur gjørt okkurt, hon ikki burdi, hon hugsar um hvat mamman fer at siga, hvussu hon sær út nú, at hon burdi tikið ein taxa. Alt tankar, sum vit kanska sjálvi høvdu hugsað í eini slíkari støðu. Men bráddliga verða vit drigin úr tankameldrinum, tá vit heldur harðliga verða konfronteraði við veruleikan: tað handlar ikki bara um teg! Og tað er júst kjarnin í nýggja rúsátakinum, at fáa okkum at

hugsa um heildina og um onnur, tí tað er ikki bara tú, sum kann koma illa fyri, um tú koyrir rúsað/ur.

Filmurin var vístur í KVF, biografi og á sosialum miðlum. Í november og desember framleiddu vit klistrimerkir, úr tilfari sum lættliga fæst av, at seta á spegl, vindeygu, borð o.a. sum varð sent til allar miðnámsskúlar og fróðskaparsetrið, umframt til hópin av skeinkistøðum.

**Skúlabyrjan**

Í august 2023, tá skúlarnir byrjaðu aftur, framdi RFF átak í samstarvi við kommunur, har bilførarar vórðu mintir á at ansa eftir skúlabørnunum við skúlarnar. Hetta við plakatum. Endamálið var at gera vart við, at í sambandi við skúlabyrjan eru aftur fleiri børn í ferðsluni, og eisini børn, sum kanska eru nýggj í ferðsluni og hartil smá og tískil ikki síggjast so væl.




Í nøkur ár hevur Ráðið fyri ferðslutrygd boðið kommununum at luttaka í átakinum. Hesaferð luttóku 10 kommunur. Tað er væl lægri enn undanfarnu ár. Okkurt árið hava 16 kommunur luttikið.



Í 2024 verður átakið eftir ætlan framt aftur, og hesaferð við nýggjum myndaevni. Seinastu tvey árini hevur mynd av fittum Eiðisbørnum prýtt plakatirnar. Í 2024 og 2025 fara tvey fitt børn úr Suðuroy at minna bilførarar á at ansa eftir skúlabørnum í ferðsluni. Eins og undanfarnu tvey árini verður møguleiki hjá kommunum at fáa egið búmerki á plakatirnar. Vónandi ynskja nógvar kommunur at luttaka í átakinum í 2024 og soleiðis fáa boðskapinum víða um í lokalu økjunum.

**Endurskin**

Ein týðandi og afturvendandi partur av arbeiðinum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd er endurskin. Við boðskapinum 'Lat teg rætt í' minna vit á týdningin við at nýta endurskin, og at tað skal vera ein náttúrligur partur av garderobuni (jakki, húgva, vøttir, endurskin).

Endurskin fáast í øllum hugsandi sniðum og týpum og tey eru sum heild løtt at fáa hendur á. Nógva staðni fáast tey púra ókeypis og RFF hevur í nógv ár latið endurskin frá Betri trygging og Trygd. Seinnu árini hava vit eisini framleitt endurskin við búmerkinum hjá RFF. Standardurin fyri endurskin verður stundum eftimettur og krøvini herd. Tað hevur sjálvandi týdning at vit fylgja við og endurskinini, sum vit lata, fylgja galdandi normkrøvum.

Vit hava altíð endurskin at lata á skrivstovuni og javnan heita einstaklingar, skúlaflokkar og onnur á okkum um at senda endurskin.

Í 2024 fara vit at framleiða nýtt endurskinsátak.




**Blinkiátak**

Um ársskiftið 2023/24 hava vit framleitt lítið átak um at brúka blinkljósið í bilinum. Hetta tí at tað kann ørkymla í ferðsluni, tá bilførarar ikki (í góðari tíð) vísa hvønn veg teir ætla sær í ferðsluni.

Til hetta endamálið fóru vit í studio og framleiddu eitt lítið tónleikabrot í hiphop-stíli – eitt rapp – um at 'brúka blinkaran'. Marius DC gjørdi tónleik og tekst, stjórin í RFF stóð sjálv handan mikrofonina og ein lítil animatión varð gjørd til sosialum miðlarnar. Átakið hevur verið brúkt sum útvarpslýsing á øllum føroysku útvarpsrásunum, og animatiónin við ljóðsporinum hevur ligið á Facebook- og Instagram-vangunum hjá RFF.



## Afturvendandi átøkini

### Ferðsludagar fyri 8. flokkum

Ferðsludagarnir fyri 8. flokkunum vóru fyri fimtu ferð hildnir í veitsluhølunum hjá Starvsfelagnum í J. H. Schrøters gøtu (í 2024 hava vit verið í øðrum hølum). Og eins og undanfarin ár eydnaðist at fáa allar skúlar við 8. flokkum til Havnar til ferðsludag.

Fyrstu ferðsludagar fóru av bakkastokki í 1998 og teir hava verið á hvørjum ári líka síðani. Hesi árini er tiltakið tillaga og dagført, men í høvuðsheitum er yvirskipaða málið tað sama - at læra um vandar í ferðsluni, avleiðingar av avgerðum okkara og tvístøðum um hvat kann gerast fyri at fyribyrgja og hvat er 'rætta' reaktiónin, tá skaðin er hendur. Tiltakið er samskipað av Ferðslutrygd og stuðlað av Trygd og Betri Trygging.

Tað er nakað serligt, at tað er eydnast at fáa heilar árgangir av føroyskum tannáringum gjøgnum skipanina við ferðsludøgum so nógv ár á rað. Í eina góða kvarta øld hava umleið 17 túsund tannáringar verið til ferðsludag. Tað er umleið 30% av fólkatalinum. Tað meta vit ger mun og tað er heilt víst ein partur av frágreiðingini til, at færri fáa skaða í ferðsluni.

Í nýggjastu hugburðskanningini, sum Lóður hevur gjørt fyri RFF, hava vit tí valt at seta nakrar spurningar um júst ferðsludagar. Hetta fyri at vita um nakar sannleiki er í uppáhaldinum. Vit hava tí millum annað spurt um fólk hava luttikið í ferðsludøgum, hvussu langt síðani og hvat tey minnast frá tiltakinum. Úrslitið av huburðskanningini verður lagt fram á ársfundinum, tann 5. apríl 2024.







**Súkkluhjálmar og endurskinsvestar til 1. floksnæmingar**
Sum helst tey einastu í heiminum fáa øll børn í Føroyum, sum fara í 1. flokk, hvør sín súkkluhjálm. Hjálmarnir verða latnir í samstarvi við Betri og Trygd. Eisini fáa teir yngstu næmingarnir (1. flokkur, ella forskúli) endurskinsvest frá Betri.




Seinnu árini eru nógvir hjálmar latnir og sniðini eru nýggj á hvørjum ári. Vit hava eintøk av flestu hjálmunum, sum eru latnir, og teir mynda eina litfagra og sjarmerandi ferðslutrygdarsøgu. Í 2023 gjørdu vit avtalu við nýggjan veitara og hjálmarnir vóru hesaferð grønir, umframt at teir høvdu endurskin og lykt aftan. Í 2024 verða hjálmarnir gulir.



## Annað virksemi í árinum, ið fór

**Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni**
Síðani 2000 hevur 1. sunnudagur í juli verið dagurin, har vit minnast tey, ið vit mistu í ferðsluni. Minningardagurin var hesaferð tann 2. Juli.

Ráðið fyri Ferðslutrygd stuðlar tiltakinum, saman við fyritøkum og einstaklingum. Ingi Gunnarsson samskipar tiltakið, tá sjálvboðin á hvørjum ári leggja blómutyssi á støð, har ferðsluvanlukkur hava kravt mannalív.




**Granskingarverkætlan um ættarlið Z**
Á ársfundinum í 2023 høvdu vit tema um ung og rúskoyring, við framløgum og sofakjaki. Rákið bæði í Føroyum og í grannalondum okkara er, at hagtølini fyri rúskoyring eru í vøkstri. Bæði fyri rúsdrekka og rúsevni. Og tað er serliga millum ung at hetta ger seg galdandi.

Firouz Gaini luttók á ársfundinum í 2023. Hann hevur granskað ungdómsmentan í Føroyum (herundir eisini ferðslumentan) og hevði framløgu um hetta. Hetta mettu vit og hann vera somikið áhugavert og aktuelt, at stig eru tikin til at gera eina granskingarverkætlan um júst ung og rúskoyring anno 2024. Ein kanning um ættarlið Z. Umframt at Fróðskaparsetrið og Ráðið fyri Ferðslutrygd eru partur í verkætlanini, letur Betri Stuðul høvuðsfíggingina, og úrslitið væntast fyrilagt á heysti 2024. Sera áhugavert verður at frætta úrslitini, tí hóast vit vita um rák um ung og rúskoyring í grannalondunum, manglar okkum kanningar sum vátta – ella avsanna – støðuna í Føroyum.

**Mentanardagar í Fuglafirði**
Hvølvus og Gøllur eru akfør hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum kunnu læra okkum um megina í trygdarbeltinum og at koma trygt úr bili, sum endar á takinum. Teir eru ikki so ofta í nýtslu, sum vit kundu hugsa okkum, men í september vórðu vit boðin at luttaka á Mentanardøgum í Fuglafirði, tá nógv ymisk tiltøk vóru á skránni. Vit vóru til staðar á Kambsdali, tá landsstýrismaðurin í Barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe, setti Mentanardagarnar og saman við honum, royndu nógvir fuglfirðingar Gøll og Hvølvus.

Eisini bar til at royna rúsdrekkabrillur, vit vegleiddu í at setta súkkluhjálmin rætt á høvdið og við minihjálminum og høsnareggum vístu vit júst hvussu effektivur súkkluhjálmurin er.





**Nýggj høli**

Árið 2023 var sera nógv merkt av, at vit komu í ta støðu, at nýggj skrivstovuhøli skuldu finnast. Í nøkur ár høvdu vit húsast í sera vælegnaðum kontórfelagsskapi í Smæruni í Havn, men á vári 2023 komu boð um, at nú skuldi nýggja Barna- og útbúgvingarmálaráðið brúka hølini og øll leigumálini vórðu uppsøgt. Í fyrstu atløgu ljóðaði, at vit kundu verða verandi í aðrari skrivstovu á matriklinum, men í august var greitt, at hetta lat seg ikki gera kortini. Hugt var eftir nógvum ymiskum møguleikum bæði í og uttanfyri høvuðsstaðin. Avbjóðingin var at finna hóskandi høli til okkara tørv – tá umræður støðd og kostnað. Tíbetur eydnaðist hetta og í dag húsast vit í snotiligum hølum í Magnus Heinasonar gøtu í Havn, saman við Amnesty International og Málmót.




Nýggju hølini eru eitt vet dýrari í rakstri enn gomlu hølini og tað ávirkar sjálvsagt fíggjarstøðuna, men als ikki so nógv, sum vit kanska høvdu óttast fyri. Sum heild eru vit tí sera væl nøgd við umstøðurnar. Skrivstovan er opin í vanligari skrivstovutíð og tað er nú (sum altíð) møguligt at støkka inn á gólvið til eitt prát um ferðslutrygd, ella fyri at fáa nøkur endurskin.

**Retro jólakalendari**
Í kjalarvørrinum av flytingini á heysti 2023, var høvi at rudda upp í góðum, gomlum tilfari. Undan kavi kom nógv stuttligt og gott tilfar frá ymiskum átøkum, sum RFF hevur framt gjøgnum árini. Plakatir, klistrimerkir, kunningarfaldarar o.a. Tað eru ofta tey somu evnini, ið ganga aftur – ferð, rúskoyring, endurskin, trygdarbelti – men sera stuttligt at síggja hvussu ymiskt boðskapurin verður miðlaður og hvussu orðavali er broytt við tíðini.

Í desember nýttu vit tí høvið at brúka góða gamla tilfarið til ein jólakalendara. Hetta varð gjørt við at deila eina nýggja mynd á okkara sosialu miðlum (facebook og instagram) av einum gomlum átaki/boðskapi hvønn dag frá 1. til 24. desember. Úrslitið var ein sjarmerandi ferð í søguni hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd – og meiri enn ein mynd festi í okkurt kjak. Um innihald og minnir – og eisini hevði onkur hug at koma við málsligum rættleiðingum. Myndirnar kunnu framvegis síggjast á okkara vangum á Facebook og Instagram.


















## Framlítandi virksemi RFF

Yvirskipað verður framhaldandi arbeiðið hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd skipað við støði í 'Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar 2019-2027'.

Uppskot til broytingar í ferðslulógini, sum eru til viðgerðar í tinginum í løtuni, fara væntandi at hava sera stóra ávirkan á ferðslutrygdina. Og er hetta væl í tráð við tilmælini í ferðslutrygdarætlanini. Tá verður hugsað um strangari revsing fyri handhildnað teleútgerð og krøv fyri endurvinning av koyrikortið ísv rúsdrekka-, ella rúsevniskoyring.

Týdningarmesta er tó at fyrireikingarnar til skaðanevnd at kanna ferðsluvanlukkur í Føroyum eru í gongd. Hetta arbeiðið fer eisini at virka fyri betri hagtalsskráseting. Hetta eru tvey tey fremstu tilmælini í ferðslutrygdarætlanini og verða tey mett at vera týdningarmestu amboðini at náa málinum um 30% færri ferðsluóhapp við fólkaskaða í 2027, við støði í tølunum frá 2018.

Ráðið fyri Ferðslutrygd fer harumframt, við støði í dagførdu ferðslutrygdarætlanini, at arbeiða miðvíst við teimum tilmælum í ferðslutrygdarætlanini, sum RFF varar av – m.a. átøk, undirvísing og hugburðskanningar. Harumframt at arbeiða víðari við kanningum av nýtslu av trygdarbelti, lóggávu viðv. handhildnari fartelefon, umframt at seta meiri ítøkiligt fokus á ung og rúskoyring. Herundir at stuðla undir betri og størri útbreiðslu av undirvísingini kring landið, og skaðahagtøl fyri hendan ferðslubólkin.

Neyðugt er framhaldandi at virka fyri átøkum at betra um vanarnar í ferðsluni. Hetta í góðum stevi við aðrar partar, sum á hvønn sín hátt arbeiða fyri betri ferðslutrygd. Átøk mótvegis stóru skaðafaktorunum í ferðsluni (ferð, gáloysni og rúskoyring) halda sostatt fram, eins og afturvendandi tiltøkini mótvegis børnum og ungum.

*5. apríl 2024*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*